## Gøtunøvn í Gásadali

Sørvágs kommuna hevur nú fingið eitt uppskot um gøtu- og veganøvn í Gásadali. Kommunan setti eina nevnd í fjør at gera uppskotið, og nevndin hevur millum annað havt borgarafund fyri bygdarfólkinum og øðrum áhugaðum, skrivar heimasíðan hjá Sørvágs kommunu. Ínevndini, sum hevur gjørt uppskotið, eru Gutti Petersen, Dávi Joensen og Solberg Henriksen. Nú hava allar bygdirnar í Sørvágs kommunu fingið gøtunøvn.

## Nýggja býarskipan

Ein verkætlanarbólkur hjá Leirvíkar kommunu arbeiðir við at gera eina nýggja byggisamtykt og býarskipan fyri kommununa, og uppskot verður lagt fyri kommununa fyrsta dagin. Ætlanin hjá bygdarráðnum er at leggja uppskotið fyri bygdarfólkið, sum so kann koma við hugskotum og viðmerkingum. Í Gøtu kommunu, sum verður løgd saman við Leirvík í Eysturkommunu, verður eisini arbeitt við nýggjari byggisamt og býarskipan.

# 8. mars í Norðurlandahúsinum

**Á altjóða kvinnudegi 2007 skipar KvinnufelagaSamskipan Føroya fyri 8. mars kvøldi í norðurlandahúsinum.**

Felagið sigur í tíðindaskrivi, at byrjað verður í forhøllini kl. 19.30, har Amnesty hevur framsýning og kunning um Trafficking in Women. Samstundis spæla Mia og Heiðrún á floytu og violin, og møguleiki verður at keypa sær okkurt leskiligt úr kaféini.

Frá kl. 20.00 til umleið kl. 21.45, verða tríggjar framløgur, spurningar og síðani orðaskifti um uppskotið til lóg um Stjórnarskipan Føroya. Framløgufólk verða Jóan Pauli Joensen, professari, rektari og formaður í Stjórnarskipanarnevndini, Margretha Nónklett, samskipari hjá Amnesty

International, Føroya deild, og Marna Jacobsen, cand.phil. í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.

Jóan Pauli fer at hava eina framløgu um uppskotið til stjórnarskipanarlóg, ið varð handað løgmanni stutt fyri jól og sum einki síðani er frætt frá.

Margretha fer at tosa um tær viðmerkingar til uppskotið til stjórnarskipanarlógina, har AI millum annað hevur lagt dent á javnstøðu av øllum slag og á nýmótans trælahandil, eisini kallað trafficking, eitt øki, ið skjótt kann gerast veruleiki í Føroyum.

Marna fer at tosa um málburðin í uppskotinum til stjórnarskipanarlógina, sum hon heldur vera ógvuliga kallmansligan.

Hon sigur m.a. í grein í Dimmu 30. januar 2007: "Lítli bóklingurin, sum kom í hvørt hús í landinum, er blóðreyður, haldi meg síggja prýðing av bæði ær og veðri. Stjórnarskipan er sum kunnugt kvennkynsorð og gevur vón um, at tað er rúm fyri báðum kynum í komandi stjórnarskipan Føroya, men hóast bæði litur, kvennkynsheiti og ær prýða permuna, so verður tú stórliga vónsvikin"

Millum framløgurnar verður møguleiki at seta spurningar, meðan orðaskiftið verður aftaná.

Solby Eliasen, tíðindakvinna verður fundarstjóri.

Allar kvinnur eru vælkomnar, siga fyriskipararnir

Vegna KvinnufelagaSamskipan Føroya

Tofta Kvinnufelag, Kongshavnar Kvinnufelag, Skála Húsmøðrafelag og Kvinnufelagið.

***Vinarliga***
*Birta Biskopstø*
*forkvinna í KSF*

# Sigur seg hava funnið grøv Jesusar

**Kendi amerikanski filmmaðurin James Cameron sigur seg hava funnið gravirnar hjá Jesusi, Mario Magdalenu og soni Jesusar í Jerusalem.**

FILMUR
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

James Cameron er ikki hvør sum helst. Tað var hann, sum gjørdi stórfilmin "Titanic", og í dag er navn hansara aftur í fjølmiðlunum kring allan heimin, eftir at hann í gjár vísti sín seinasta film, har hann vil vera við, at hann hevur funnið grøv Jesusar í Jerusalem. Filmin hevur hann gjørt saman við ísraelska filmmanninum Simcha Jacobovici.

Í grøvini eru fleiri skrín úr steini, og á teimum eru tekstir, sum serkøn sambært James Cameron lesa sum "Jesus", "Maria Magdalena" og "Juda, sonur Jesusar".

-Vit hava einki fysiskt prógv fyri, at Jesus hevur livað. Men fyri fyrstu ferð kann ein filmur vísa fysisk og fornfrøðilig og á ein hátt eisini teknisk prógv, sum hjá einum leikmanni tykjast sera sannførandi, segði James Cameron á tíðindafundi, sum hann helt í New York í gjárkvøldið, tá filmurin varð sýndur fyrstu ferð. Sambært tí viðurkenda filmmanninum byggir filmurin millum annað á DNA-kanningar hjá einum ein heimsins fremstu rannsóknarstovnum, og hann vil eisini vera við, at týðandi granskarar taka undir við tí, sum filmurin vísir.


*Jesu grøv*

**Søluátak**

Nógvir granskarar vísa aftur tí, sum filmurin sigst vísa, og summi halda, at menninir aftan fyri filmin brúkastórtíðindini við tí fyri eyga at selja filmin.

-Tað er eingin ivi um, at hetta hevur einans til endamáls at selja filmin, sigur ísraelski fornfrøðingurin Amos Kloner. Tað sama sigur amerikanski professarin James Tabor.

Onnur vísa á, at nøvnini Jesus, Maria og Juda vóru so vanlig á Jesusar døgum, at tað ber væl til at finna hesi nøvnini saman, uttan at tað nýtist at hava nakað við teir bíbilsku persónarnar at gera.

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

## Brot úr skeiðskrá á KVASIR

**EXCEL - SEMINAR**
**Lær tips og triks í Excel**

Ein av Danmarks bestu Excel-ekspertum Ernst Lohse er í Føroyum í næstu viku. KVASIR bjóðar í tí sambandi Excel brúkarum eitt ógloymandi inspiratiónsseminar, har Ernst Lohse fer igjøgnum eina røð av hugskotum og snildum í Excel við støðu í, hvussu tær dagligu uppgávurnar kunnu loysast á fullgóðan hátt.

**01/03 Excel seminar** 1 x kl. 16.00-18.00: 01/03

**07/03 Grundskeið í KT teori**
3 x kl. 13.30-16.30: 07/03+14/03+21/03

**08/03 Lær at nýta Internet**
3 x kl. 09.00-12.00: 08/03+15/03+29/03

**09/03 Lær at nýta Rokniark**
3 x kl. 09.00-12.00: 09/03+16/03+23/03

**13/03 InDesign - grundskeið**
2 x kl. 08.30-15.30: 13/03+15/03



**14/03 Lær at nýta Bókhald - framhaldskeið**
3 x kl. 09.00-12.00: 14/03+21/03+28/03

**19/03 Lær at nýta Heimasíðusmíð**
3 x kl. 09.00-12.00: 19/03+22/03+26/03

**11/04 Grundskeið í Tekstviðgerð við MS Word**
4 x kl. 13.30-16.30: 11/04+18/04+02/05+09/05

**12/04 Grundskeið í rokniarki við MS Excel**
4 x kl. 09.00-12.00: 12/04+19/04+26/04+03/05

**13/04 Lær at nýta Outlook**
3 x kl. 09.00-12.00: 13/04+20/04+27/04

**SØLUSKEIÐ**
**Við sera áhugaverdum innihaldi:**
**- Barrierer i kundekontakt**
**- Sælgerens adfærd i kundekontakten og kommunikation med forskellige kundetyper**
**- Kommunikation og behovsafdækning**
**- Argumentationsteknik, invendingsbehandling og afslutning**
**17/04** 4 x kl. 09.00-15.00: 17/4+19/4+24/4+26/4
**Skeiðleiðarar: Lene Bilde Jacobsen og Sam Jakobsen**

**Broytingar og fleiri skeið kunnu koma á skránna**

**KVASIR**
**320 204**
**www.kvasir.fo - kvasir@farodane.fo**